

# POLITISKUR RUÐULEIKI *ella* VERULIGT FÓLKARÆÐI

SÍÐAN **FÓLKAFLOKKURIN** FÓR ÚR **LANDSSTÝRINUM**, HEVUR EITT **MINNILUTA-LANDSSTÝRI** SITIÐ Á **LANDSSTÝRISSESSUNUM**, MEÐAN SKIFTANDI **MEIRILUTAR** HAVA **SAMTYKT** HÓPIN AV **LÓGARUPPSKOTUM** Í LØGTINGINUM. SUMMI KALLA **STØÐUNA** RUÐULEIKA, **MEÐAN** ONNUR HALDA, AT NÚ SLEPPUR **FÓLKARÆÐIÐ** LOKSINS AT **VIRKA**. KANSKA ER VERANDI STØÐA **SPÍRIN** TIL, AT POLITISKA **SKIPANIN** VERÐUR BÚGVIN TIL, AT **MINNILUTASAMGONGUR** KUNNU VERÐA SKIPAÐAR Í **FØROYUM**



**POLITIKKUR**

Uni Arge
ua@sosialurin.fo

Rumbul og skrumbl eyðkendi tingfundin fríggjadagin og leygarnáttina, tá løgtingið í samfullar 18 tímar viðgjørdi 27 lógaruppskot, segði formaðurin í Fólkaflokkinum, Jørgen Niclasen, í lesarabrævi fyrr í vikuni. Hann hevði eygleitt, at bæði møði og øði eyðkendu viðgerðirnar og átalaði tilvildarligu atferðina hjá løgtinginum hendan søguliga drúgva tingfundin. Eisini Bjarni Djurholm úr Fólkaflokkinum helt støðuna vera púra burturvið. Tingviðgerðin var merkt av ráksnúni og taktiskum snildi, og nú var ein reyð avgjaldsgonga vorðin parlamentariska grundarlagið undir Kaj Leo Johannesen, løgmanni, segði hann.

Soleiðis sum fólkafloksmenn hava útlagt veruleikan, er lítið og onki skil í nøkrum. Hetta halda teir helst, tí tað vanliga hevur verið, at ein meirilutasamgonga hevur sitið trygt á valdinum og samtykt tað, hon sjálv legði fram, meðan andstøðan mátti smyrja seg við at hava góð hugskot, ið ongantíð vórðu samtykt, tí meirilutin ræður jú. Men meirilutin kann vera eitt fyribrigdi í ymsum hamum. Meirilutin kann vera tann sami meirilutin í fýra ár, men hann kann eisini vera fýra, fimm ymsir meirilutar í ein mánað. Hetta seinna fyribrigdið hevur gjørt um seg nú í seinastuni, og tað er áhugavert.

## Troytt av blokadum

Tosaði tú við løgtingsfólk fyri einum hálvum ári síðan ella so, serliga tey yngru, men eisini onnur, so hoyrdi tú skjótt, at tey vóru troytt av at sita í einum tingi, har semja var um nógvar góðar tankar tvørtur um flokkarnar, men har tankarnir ongantíð gjørdust samtyktur politikkur, tí partar av tinginum blokeraðu fyri tí. Ta greiðastu útsøgnina um júst hetta hevði Poul Michelsen, tá hann fór úr Fólkaflokkinum. Hann vildi hava alskyns reformar framdar á tingi, ikki minst ígjøgnum Fólkaflokkin, men skiftandi minnilutar stóðu á bremsuni, og onki bar til. Endin varð so, at hann takkaði fyri seg.

Tingmenn úr øðrum flokkum hava eisini á annan hátt víst sína misnøgd við, at løgtingið hevur flutt seg so lítið í stórmálum. Nakrir teirra gjørdu tí ikki mætari enn at leggja uppskot fram á ting um at minka talið á tingmonnum úr 33 niður í 25. Hóast hetta kundi tykjast sum eitt populistiskt uppskot, ið skuldi tekkjast veljarunum, hevði tað ivaleyst eisini sín uppruna í eini frustratión millum uppskotsstillararnar um, at løgtingið hevur verið so trekt at flyta í mongum málum. Færri tingfólk kundu tí kanska bøtt um standin, men hetta vildu tingfólkini sjálv ikki hoyra talan um, og tí fall uppskotið.

So var tað, at Fólkaflokkurin fór burtur úr landsstýrinum. Hann kundi ikki taka undir við fíggjarkørmunum, segði hann og fór, samstundis sum fleiri av hinum flokkunum rumblaðu um tilfeingisgjald og aðrar nýskipanir, ið flokkurin hevur verið hart ímóti. Fólkaflokkurin vildi hava og hevði kanska eisini væntað nýval beinanvegin, men Kaj Leo Johannesen, løgmaður, skalv ikki á hondum. Hann fór fyrst at tosa við Miðflokkin og Framsókn um samgongu, men tað gekk ikki, og so gjørdi hann tað, sum ongin hevði væntað. Sambandsløgmaðurin fór at tosa við Tjóðveldi um samstarv.

## Ein søgulig semja

Makrelsemjan millum minnilutasamgonguna, Tjóðveldi og Framsókn var ein sera áhugaverd semja, ikki bara tí hon sum tann fyrsta politiska avtalan nakrantíð ruddar slóð fyri nógv umrødda tilfeingisgjaldinum á ogn Føroya fólks, men eisini tí hon vísir, at til ber hjá eini minnilutasamgongu í Føroyum at gera avtalu við andstøðuna um eitt stórt prinsippmál. Tað var jú hetta, sum ongantíð bar til. Avtalan lýsir neyvt, hvussu partar av høvuðsvinnuni skulu umskipast eftir nýggjum meginreglum, og tað má sigast at vera ein nýskapan í føroyskum politikki, ið kundi verið spírin til fleiri tilíkar týðandi avtalur.

Flokkarnir, ið hava gjørt makrelavtaluna, hava sjálvandi gjørt hana, tí teir halda, at hon var neyðug at gera. Men teir hava ivaleyst eisini arbeitt hart fyri at fáa hana framda, tí teir vildu prógva, at til bar at gera eina av-